## DAGSINS MEINING

# Nú nærkast

Í hesum døgum verða teir seinastu 1000 metrarnir og gott og væl tað boraðir á føroyska landgrunninum – oljuleitingin nærkast endanum. Og eftir hvat skilst er óvissan framvegis stór. Oljumálastýrið hevur tryggjað sær, at eingir upplýsingar skulu fara út til almenningin, soleingi borað verður. Við øðrum orðum vita vit ikki, hvønn veg tað ber. Og tað kann ganga báðar vegir.

Taka við so sannlíkini fyri at finna olju eru tey ávikavist 30 og 42%. Ella kunnu vit venda tí á høvdið og siga, at sannlíkini fyri, at tað ikki verður funnið nakað, eru 70 og 58%. Hetta er nakað, sum vit eiga at hava í huganum, nú tað verður bíðað í spenningi eftir úrslitinum.

Tann møguleiki er eisini til steðar, at føroysku oljumyndugleikarnir velja einki at siga um hesar fyrstu boringarnar men heldur at bíða til tann triðja boringin er liðug í oktober ella november.

Út av trimum boringum skuldi helst okkurt komið burturúr. Men vil tað illa til, so hava oljufeløgini kortini bundið seg til at bora fimm brunnar aftrat hesum fyrstu trimum. Tvs. at møguleiki er fyri, at fyrsta oljan – er hon til – verður ikki funnin fyrr enn í næsta ár ella í 2003. Feløgini hava nevniliga møguleika at bíða við hinum boringunum til 2003.

Tað eru tey, sum siga, at so mikið nógv hevur verið tosað um hesa oljuleiting, at fólk rætt og slætt rokna við, at okkurt skal verða funnið. Hinvegin er eisini greitt, at hóast seismiskar kanningar vísa bæði eitt og annað, so eru tær ongantíð annað enn vegleiðarar. Aftur og aftur hava seismiskar kanningar víst seg ikki at verða nóg eftirfarandi. So tað kann eisini henda her hjá okkum.

Tí er rætt ikki at kanna sær bitan ov tíðliga. Tað er tí heldur ikki rætt av okkara politikarum at kalkulera við oljuinntøkum. Men at samfelagið er »gierað« til, at olja verður funnin, er tó ikki meira enn náttúrligt, tá hugsað verður um alla ta tilrættalegging, sum verið hevur undan boringunum. Ein skilagóð tilrættalegging fáa vit at vita frá teimum serkønu.

Leitingin hevur longu givið arbeiði til nógvar hendur og er so smátt við at fáa samfelagnum nýggjar inntøkur. Talan er um eina altjóða vinnu, so verður eingin olja her hjá okkum í fyrstu atløgu, nýtist tað ikki at vera nakað veruligt afturstig. Eydnast leitingin harafturímóti væl, so er hetta ein stór avbjóðing fyri okkum øll. Tá – onkur heldur tað verða í seinna lagi – mugu vit gera okkum púra greitt, hvat vit vilja og hvussu vit skulu at stýra gongdini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tað rakar ikki tykkum!

## -sigur landsstýrismaðurin við fólkið og fakfeløgini um pensjónsætlaninar



**Hans Pauli Strøm**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*

Útvarpið bar í gjár eina stak ófantaliga fráboðan frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum viðvíkjandi ætlanunum hjá landsstýrissamgonguni um eina nýggja tvungna pensjónsskipan. Boðini frá landsstýrinum vóru send almenninginum, men við serligari heilsu til fakfeløgini. Í stuttum var innihaldið hetta: »Tað rakar ikki tykkum!«

Tað eru nú 3 ár síðan, at landsstýrið boðaði frá, at tað fór at koma við einum uppskoti til eina heilt nýggja pensjónsskipan fyri allar føroyingar. Eins og Javnaðarflokkurin hava fakfeløgini kravt,

- fyri tað fyrsta at fáa innlit í ætlaninar, og
- fyri tað næsta at allir avvarðandi partar, allir politiskir flokkar, fakfeløgini og pensjonistafelagsskapirnir, fingu veruliga ávirkan og møguleikar at luttaka í tilevningini av uppskotinum.

Hetta hava vit kravt, tí at ein nýggj pensjónsskipan

- fevnir um so týðandi partar av lívskorunum hjá øllum fólkinum,
- hon røkkur langt út um eina samgongu og hevur avleiðingar fyri ættarlið fram í tíðina, og
- ein pensjónsskipan er ikki eitt samgongumál men skal byggja á eina víðfevnandi politiska semju og hava fulla undirtøku bæði á arbeiðsmarknaðinum og í fólkinum annars.

Men ístaðin fyri innlit, so hevur landsstýrið roynt at dult sínar ætlanir sum mansmorð. Og ístaðin fyri ávirkan, so hevur landsstýrið stongt allar aðrar partar úti, hinar flokkarnar eins og fakfeløgini.

Nú fréttist, at uppskotið ER gjørt. Útvarpið boðar frá landsstýrismanninum, at: »Uppskot um lógartekst er gjørt.« Ja, tað er komið so langt, at eftir er bara smálutir: »Serfrøðingar skulu nú snikka uppskotið til, m.a. skulu tryggingartekninskar útrokningar gerast.«

Men fakfeløgini skulu ikki billa sær nakað inn, sigur landsstýrismaðurin. Fakfeløgini skulu ikki billa sær inn, at tey longu nú kunnu loyva sær at koma fram við sínum hugsanum um pensjónsætlaninar fyri teirra limir, sigur landsstýrismaðurin. Tí, sigur hann við útvarpið: »Fakfeløgini vita ikki, hvussu landsstýrið ætlar at loysa pensjónsmálið, og tí hava tey onki grundarlag at mótmæla á«.

### Makan til frekleika !

Fakfeløgini skulu blanda seg uttanum: »Lógaruppskotið verður ikki gjørt í samstarvi við fakfeløgini – tað er ikki vanlig mannagongd«, sigur landsstýrismaðurin um mátan, hetta landsstýrið arbeiðir við pensjónsviðurskiftunum hjá fakfelagslimunum.

Nei, fakfeløgini skulu ikki billa sær nakað inn, sigur landsstýrismaðurin: »Tí tá samanum kemur noyðast fakfeløgini at góðtaka tað, sum meirilutin á Føroya Løgtingi samtykkir«.

Á jú, »Fakfeløgini skulu verða hoyrd«, sigur landsstýrismaðurin. men tað verður ikki hastiliga, og ikki fyrr enn alt er leyst og liðugt. Og landsstýrið leggur vertin í, hvat flokkarnir uttan fyri samgonguna halda um málið. Tí fyrst er sum sagt nakað av »snikkaraarbeiði« eftir í landsstýrinum. Og einaferð, »Tá arbeiðið er heilt liðugt, er politiska viðgerðin í samgonguni fyrst á skránni«. Tá ið so einaferð tann vanliga »viðgerðin« í samgonguni við at klórast og roytast og morlast er liðug, »so verður uppskotið sent til hoyringar m.a. hjá fakfeløgunum«.

Tástani kunnu fakfeløgini, flokkarnir uttan fyri samgonguna og onnur sleppa at gera sína ávirkan galdandi. Og ongin ivi er um, at størsta ávirkanin, vit tá kunnu gera, er at blaka hetta landsstýrið og hesa samgonguna á bláman – eru teir ikki longu farnir til botns.

Henda seinasta fráboðanin frá landsstýrinum var so vanvirðislig og skilaleys, at eg haldi hon drap tað síðstu vónina sum kundi verða um møguleikan at røkka eina semju um pensjónsviðurskiftini, so longi henda fólkafíggindaliga samgongan situr við ræði. Tað tykist nú at verða neyðugt at fáa hetta afturhaldslandsstýrið fáast frá sum skjótast, fyri at kunna fremja tær neyðugu broytingarnar í eftirlønar- ella pensjónsviðurskiftunum, soleiðis sum fakfeløgini og ein stórur politiskur meiriluti vil tað – nevnliga á samhaldsføstum grundarlagi.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Nú koma loysingar-rokningarnar

**Edmund Joensen**



**Tann fyrsta rokningin (á 400 mió. krónur) kemur á nýggjárinum. - Palleba skal gjalda.**

Útreiðslur fyri 400 mió. krónur, sum higartil hava verið goldnar av donsku fíggjarlógini, verða frá 1. januar komandi ár fluttar yvir á útreiðslusíðuna á føroysku fíggjarlógini. Henda útreiðsla skal leggjast omaná núverandi skatta- og avgjaldsrokning hjá føroyingum hvørt einasta ár framyvir.

Við Fólkaflokkinum á odda, leggur samgongan nú henda økta skatt á føroyingar, og hetta endar í seinna enda sum byrða hjá vinnulívinum. Føroyska samfelagið missir fyri allar tíðir 400 mió. krónur í fruminntøkum um árið. Hetta eru inntøkur, sum sambært Hvítubók viga tvær til tríggjar ferðir upphæddina í føroyska búskapinum.

Hetta er tað, sum liggur í uppskotinum um yvirtøkur av skúla- og forsorgarmálum. Áðrenn tað hevur samgongan sagt ja til yvirtøku av skipasýninum, flogvøllinum og útreiðslum í hesum sambandi.

400 mió. krónur um árið eru ikki smápengar at leggja á skattaborgaran. Bara fyri stuttari tíð síðani var henda upphædd helvtin av øllum landsskattinum hjá øllum føroyingum tilsamans.

### Hitar ikki búskapin

Vit í Sambandsflokkinum settu fram uppskot um at seta 400 mió. krónur í grunn í ár, og aftur 400 mió. næsta ár, fyri at hækka pensjónina longu frá 1. januar komandi. Á henda hátt skuldi partur av pensjónini gerast sjálvfíggjandi. Tiltakið hevði tálma upphitingini í búskapinum og hevði virkað beinanvegin.

Sambandsflokkurin hevur verið heitur talsmaður fyri, at styrkja føroyska samfelagið, nú løgir eru.

Tað hitar ikki búskapin at gjalda niður stóru landsskuldina, sum er umleið 5 milliardir krónur. Tað hitar ongan búskap, um vit byggja nýtt Suðuroyarskip uttanlanda. Møgulig gagnlig búskapartiltøk, sum tálma upphitaða føroyska búskapin, tey tróta ikki. Men landsstýrið raðfestir loysing og fullveldi ovast, kosta hvat tað kosta vil.

### Nú koma rokningarnar

Nú byrja tær stóru rokningarnar frá loysingarlandsstýrinum at koma, og hetta er bert byrjanin, sambært ætlan landsstýrisins.

Í prestigeprojektinum hjá Anfinni og Høgna, verður als ikki hugsað um trygd og vælferð hjá føroyingum.

Eg vóni, at hetta stendur sólarklárt fyri hvørjum einasta føroyingi. Eg vóni eisini, at føroyingar á komandi vali, effektivt fara at steðga hesum politiska ørðskapi.

# Føroyski fólkaskúlin august 2001

**Emmy S. Joensen,**
*næstformaður í Føroya Lærarafelag*



Um nakrar dagar byrja skúlarnir aftur, og skúlaárið 2001/2002 fer av bakkastokki. Rokið um tímajáttanina til hetta skúlaárið er av á hesum sinni og burtursæð frá, at vit hava fingið nýggjan landstýrismann í skúlamálum, nýggjur deildarstjóri er settur á fólkaskúladeildini, tey nýggju skúlastýrini hava tikið við, og at í løgmansrøðuni var boðað frá, at fólkaskúlin skuldi raðfestast hægri, so kann tað tykjast, sum um øll viðurskifti eru komin í rættlag og friður og sæla aftur valdar á fólkaskúlaøkinum. Lærarar og skúlaleiðarar koma aftur úr summarfrí við hugsanini um, at alt lagar seg nokk, alt man fara at ganga kortini.

Men so einfaldur er veruleikin neyvan.

Óivað eru allir skúlaleiðar liðnir at leggja tímatalvurnar, øll størv eru sett osfr., so einki skuldi verið til hindurs fyri, at skúlagongdin kann byrja sum vanligt.

Men kortini eru fleiri øki í skúlunum merkt av ruðuleika og ráðaloysi. Tað eru nógv viðurskifti, sum vit eiga at tosa um og viðgera. Viðurskifti, ið hava samband við arbeiðsumstøðurnar hjá lærararum og leiðarum.

Hvussu gongur t. d. við hesum nýggju uppgávunum og nýggju krøvunum, sum eru sett skúlunum? Hvussu klára lærarar og leiðarar hetta arbeiðið?

Alt gott um ársætlanir, verkætlanaruppgávur, toymisarbeiði, felags ráðlegging o. a. Hetta eru sera spennandi avbjóðingar, og eru hesar uttan iva við til at menna fólkaskúlan. At lærarar eru farnir so miðvíst og eldhugaðir í holt við hesar uppgávur, vísir bara, hvussu dugnaligar og ábyrgdarfullar lærarar vit hava í Føroyum.

Men eitt tað týdningarmesta, tá ið farið verður undir nakað nýtt er at gera upp, taka saman um og meta, hvussu arbeiðið royndist. Hvat var gott og hvat var minni gott. Hvat eydnaðist og hvat miseydnaðist osfr.

Hesin parturin er dottin burtur ímillum eftir mínum tykki. Skúlarnir hava óivað hvør í sínum lagi mett um tær royndir, teir hava gjørt við hesum nýggju uppgávunum. Og alt gott um tað.

Men er tað nóg mikið í hesum sambandi?

Hevði tað ikki havt týdning fyri skúlamyndugleikan at kanna eftir, hvussu tað higartil hevur gingist við at fremja lógini í verki. Týdningarmikið átti at verið at fingið áskoðanir og eftirmetingar hjá teimum lærararum, sum hava verið við í hesum slóðbrótandi arbeiði fram í ljósið og samskipa og brúkt tær miðvíst til víðari menning av fólkaskúlanum!

Tað tekur tíð at gera so kollveltandi broytingar, sum skúlalógin frá 1997 leggur upp til. Men tey, sum dagliga starvast í skúlanum merkja ikki, at tað hevur áhugað frá myndugleikanum at vita, hvussu arbeiðið nú royndist. Lítil og eingin áhugi tykist vera fyri royndunum, sum skúlarnir hava gjørt hesi árini, nýggja lógin hevur virkað.

Í staðin fyri koma nýggj og onnur krøv, sum skulu gerast og setast í verk. Eingin tíð verður sett til at viðgera arbeiðið, ið er gjørt, sett í verk ella er í gongd, og tí er stórur vandi fyri, at nóg verður gjørt uttan mið og mál. Henda gongdin kann ikki halda fram. Lærarar og leiðarar mugu fáa tíð til at konsentrera seg um nøkur evni ella nakrar uppgávur og ikki kenna seg noyddar til at gapa um alt í senn. Fylgjan av verandi mannagongd er, at lærarar og leiðarar fáa kensluna av at vera hálvir allastaðni og fáa ikki fylgt nøkrum nóg væl upp.

### Trivnaðurin hjá lærararum

Í samband við at teir donsku skúlarnir byrjaðu aftur í síðstu viku varð almannakunngjørt ein kanning, hvussu danskir lærarar trívast í sínum starvi.

Kanningin vísir heilt greitt, at stórur ruðuleiki valdar í tí danska fólkaskúlanum. Lærarar trívast illa, og annarhvør lærari hugsar um at gevast ella skifta starvsøki, tí teir ikki halda seg kunna fylgja við teimum øktu krøvunum í lærarayrkinum.

Fleiri við mær øtaðust óivað av hesum tíðindum og hugsaðu, um støðan hjá okkum er stórt mætari.

Lyklapersónarnir í fólkaskúlanum eru lærararnir, og tað eru teir, sum hava størstu ávirkanina á, hvussu skúlagongdin hjá okkara børnum kemur at verða. Tí er tað av alstórum týdningi, at teir trívast í sínum arbeiðið. Uttan at nøkur kanning er gjørd av okkara skúlaviðurskiftum, so fari eg at pástanda, at vit hava viðurskifti, sum vísa, at tað uttan iva er so sum so við trivnaðinum hjá lærarum í okkara skúlum.

Her eru nøkur dømi:

- hækkandi næmingatali í flokkunum ger, at lærarar hava ov lítla tíð til hvør einstakt barn
- tann uppalingarliga uppgávan fyllir meir og meir
- foreldur gerast meira og meira krevjandi
- fleiri og fleiri tosa um at royna okkurt annað
- lærаratrotið ger, at fleiri og fleiri ófaklærd arbeiða í skúlunum
- kynsbýti er við at fara av lagi, tí færri mannfólk velja at verða lærarar
- skúlin skal verða fyri øll, men játtanin til børn, sum hava serligan tørv, er langt frá nøktandi
- eingi alternativ tilboð eru til tey børnini, sum hava atferðartrupuleikar
- eingin møguleiki fyri eftirútbúgving

Hesi viðurskifti mugu takast í størsta álvara og gerast nakað við, so skúlin ikki missir dugnarligar lærarar og harvið verður enn meira afturútsilgdur.

Men á hesum økinum síggjast eingi tekin um, at mynduleikin er greiður yvir støðuna og enn minni at ætlanir eru um at gera nakað fyri at venda hesi gongd.

Nei heldur tvørturímóti. Nakað, sum almennir stovnar og onnur arbeiðspláss lýsa við, tá ið tey lýsa eftir starvsfólki, er møguleiki fyri persónligari menning og eftirútbúgving. Hetta fyri at fáa fólk at støðast og trívast. Í fólkaskúlanum verður farið hin vegin. Tí her var øll eftirútbúgving spard burtur fyri, at fíggjarjáttanin kann halda. Tí er ring at fáa eyga á nakran bata í bræði. Og tað sum er stungið út í korti í løgmansrøðuni, at fólkaskúlin skal raðfestast fremri tykist bert sum uppafturtøka og tóm orð.

Vónirnar um, at politikkarar fara at skapa betri umstøður og karmar fyri lærarar, leiðarar, børn og foreldur í fólkaskúlanum eru sera smáar.

Fortreytirnar fyri at, at lærarar kunna skapa góðar umstøður og trivnað fyri tað uppvaksandi ættarliðið eru, at teir hava góðar karmar at virka undir.

### Hvat vilja vit við okkara skúla?

Tey seinastu nógvu árini hevur tjakið um skúlaviðurskifti í Føroyum bert snúð seg um sparingar, frymlar, lønartrætur, bygdastríð, ársverk, o. a. Greinar sum hava havt við námsfrøði og skúlamenning at gera hava verið sera sjáldsamar, í teimum føroyskum fjølmiðlunum øll 90'árini. Og tað er kanska ikki so løgið, um vit hugsa um støðuna, samfelagið var í hesi árini. Men einaferð mugu vit byrja aftur at hyggja frameftir skúlanum viðvíkjandi. Einaferð mugu vit aftur seta hol á tjakið um, hvussu vit best skipa okkara skúla og hvussu vit kundu hugsað okkum, at framtíðarskúlin skal síggja út.

Tjak og orðaskifti um skúlaviðurskifti eru alneyðug og trygd fyri, at skúlin er í støðugari menning og ikki stirðnar.

Men her mugu politikarnir slóða fyri.

Hvat nyttar at taka alt grundarlagið undar eftirútbúgving av fólkaskúlalærarum í mai mánaða og á ólavsøku sama ár lova hægri raðfesting av fólkaskúlanum og aðalorðaskifti um hesi viðurskifti? Nei hetta skapar ikki álit. Heldur vísir tað, hvussu tilvildarliga farið verður fram, og hvussu lágt hetta øki verður raðfest.

Politikarnir mugu seta ítøkilig tiltøk í verk, sum muna. Skapa karmar og játtanir, sum kunnu verða við til at venda tí skeivu gongd, sum hevur valdað í fólkaskúlanum hesi seinastu árini.

Kanska ov daprir og fløktir tankar beint áðrenn skúlaárbyrjan, men kanska kann hetta verða við til at seta hol á eitt tjak. Og kanska tá ið fíggjarlógin er samtykt, aðalorðaskifti um skúlaviðurskifti eru farin afturum bak, fer at hómast ein vilji til at vísa í verki, at fólkaskúlin verður raðfestur hægri.

Annars fari eg at ynskja øllum sum varða av fólkaskúlanum eitt gott skúlaár, við vón um, at í skúlaárið 2001/2002 fer gongdin at bera á ein meiri positivan bógv so glaðari og fleiri námsfrøðiligir tónar aftur fara at ljóða frá okkara starvsøki.